# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Handilsskúlin á Kambsdali tekur nú eitt veruligt stig mótvegis føroyskari elitumenning. fyrsta árið verður royndarár, men skúlastjórin vónar, at átakið kann mennast*

# Handilsskúlin sum ítróttarskúli

**Ungir og evnaríkir fótbóltsspælarar í Føroyum fáa nú eitt nýtt tilboð. Frá í heyst at rokna fer Handilsskúlin á Kambsdali at hava serliga linju, har skúlin í samstarvi við Ítróttarsambandið og Fótbóltssambandið gevur nýtt undirvísingartilboð. Eitt tilboð, sum vónandi eisini kann útbyggjast til aðrar skúlar og ítróttagreinar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroya Handilsskúli á Kambsdali, Ítróttarsamband Føroya og Fótbóltssamband Føroya hava avgjørt at fara undir eina royndarverkætlan, ið byggir á somu skipan, ið feløg í hinum norðurlondunum nýta í samstarvi við miðnámsskúlarnar fyri at menna evnarík ítróttarfólk enn meira.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at Endamálið við nýggja skúlatilboðnum er at geva ungur evnaríkum leikarum ein serstakan møguleika at mennast enn meira í aldrinum 15 til 18 ár.

- Í ítróttarligu menningini hjá ungdómi eru árini, tey vanliga ganga í miðnámsskúla, avgerandi. Líkamliga menningin er stór hesi árini, og kann røtt og nógv venjing geva góð úrslit.

- Ítróttasálarliga hava árini eisini stóran týdning. Rættur liviháttur kann vera avgerandi fyri, um tey seinni kunnu standa seg sum yrkisítróttafólk. Rættur liviháttur og miðvís venjing eru treytað av, at tey ungu tilvitað velja at liva sum ítróttafólk.

## Teori og praksis

Tilboðið, sum skúlin nú fer at bjóða, fevnir um bæði praktiska venjing og ástøðiliga partin av hesum.

Umframt vanligu skúlagongdina, skal næmingurin hava seks tímar eyka um vikuna. Fýra av hesum tímum verður fótbóltsvenjing, sum Eyðun Klakstein stendur fyri. Hinum báðum tímunum stendur Sølvi R. Hansen, ítróttarráðgevi, fyri, og verður talan her um ástøðiliga partin av ítróttarlívinum.

## Bara spírin

Gongst sum ætlað, so er komandi skúlaárið bara spírin til eitt tilboð, har evnaríkastu føroysku ítróttarfólkini fáa ein møguleika at mennast her á landi.

- Vit hava fleiri dømi úr útlandinum, har ítróttarfeløg hava síni egnu college, har spælarar innan ymsar ítróttagreinar verða mentir. Enn er talan um royndarár hjá okkum, og fíggingin røkkur í løtuni bert til tað eina árið á FHS, Men vit síggja hetta sum eitt tilboð, ið hevur eina góða framtíð. Og vónandi fáa við tíðini eitt tilboð, sum eisini fevnir um aðrar ítróttagreinar og aðrar skúlar.

- Í løtuni er støðan ofta tann, at ung ítróttarfólk mugu velja, tá miðnámsskúlaárini standa fyri framman. Velja tey ítróttin framum, mugu tey uttanlands á skúla, og tað er ikki so víst, at hetta altíð er tað rætta. Hinvegin steðga tey aloftast upp í ítróttarligu menningini, um tey vilja gera skúlagongdina liðna í Føroyum. Vit hava jú hópatals dømi um, at munurin til javnaldrar uttanlands ikki er so stórur um 15-16 ára aldur, men at sami munur síðani økist, tí føroyskir spælarar ikki fáa somu venjing, sum tey fáa uttanlands, sigur Páll Isholm, skúlastjóri.

## FAKTA

**Samskiparin**
Samskipari av verkætlanini verður Sølvi Reinert Hansen, ítróttar og ungdómsráðgevi hjá ÍSF. Sølvi hevur áður starvast á Handilsskúlanum og hevur eisini nomið sær útbúgving innan lestrarvegleiðarayrki. Sølvi hevur harumframt drúgvar royndir sum virkin íðkari inni frælsan ítrótt.

**Venjarin**
Høvuðsvenjari verður Eyðun Klaksstein, ið hevur UEFA A-venjaraprógv og drúgvar royndir sum ungdómsvenjari. Í ár er hann hjálparvenjari hjá Formuladeildarliðnum hjá KÍ. Eyðun hevur eisini drúgvar royndir sum leikari á hægsta stigi í Føroyum.

# Ein fortreyt fyri menning

**Størri tilvitan og meira venjing. Tað eru tvær avgjørdar fortreytir, um føroysk ítróttarfólk skulu mennast meira, heldur ítróttarráðgevin hjá ÍSF**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sølvi Reinert Hansen, ítróttarráðgevi hjá ÍSF, er samskipari av verkætlanini við Handilsskúlan á Kambsdali. Eini verkætlan, sum fyrsta árið eisini verður stuðlað fíggjarliga av Fótbóltssambandinum.

Og hann er ikki í iva um, at hetta er eitt átak, sum væl kann vera við til at hækka støði á føroyskum ítrótti.

- Tað eru fyrst og fremst tvinnir lutir, sum eru neyðugir, um vit skulu hækka støðið, og tað eru eru eisini hesir lutir, sum vit medda eftir í verkætlanini.

- Ástøðiliga, so er tað av stórum týdningi, fólk á ungum árum læra, hvat tað vil siga at liva sum elitu-ítróttarfólk. Tú skalt snøgt sagt velja rætta lívsstílin, har kostur, hvíld og venjing eru ein integreraður partur av gerandisdegnum. Verður hetta ikki gjørt, síggja vit ofta støðuna, har t.d. ein evnaríkur fótbóltsspælari fær hópin av skaðum at dragast við, tá hann fær sáttmála uttanlands. Kroppurin er als ikki vanur við somikið nógva venjing, tí spælarin ongan tíð hevur lært, hvat tað vil siga at liva sum elitu-ítróttarfólk.

- Í øðrum lagi, so er sjálv venjingin sjálvandi ein fortreyt fyri menning. Uttan mun til ítróttargrein, so er økt venjing viðvirkandi til øktan førleika. Og umframt hetta, so er tað eisini ein fyrimunur, at venjingin fevnir um heilt skúlaár. Ein stórur trupulleiki innan føroyska ítrótt er, at steðgurin í venjingunum er alt ov langur. Heldur tú pausu í fleiri mánaðir um veturin, so skal ein alt ov stórur partur av venjingini í nýggja árinum nýtast til at koma á sama støði, sum tú vart á, heldur enn til at byggja víðari upp á tað, sum varð vunnið árið fyri. Við at venja alt árið, slepst eisini undan hesum trupulleikanum, vísir Sølvi á.

Hann vísir tó samstundis á, at tað er umráðandi, at venjingin fer fram í góðum samskifti við tey feløg, haðani spælararnir stava.

- Tað skal jú heldur ikki gerast ov møtumikið hjá spælarunum. Tí verður ein ætlan løgd saman við venjarunum í einstøku feløgunum. Hevur felagið harða fysiska venjing onkran dagin, so verður talan kanska um meira taktiska og tekniska venjing í skúlanum. Og so kann tíðarskeiðið, har fótbólturin liggur stillur, kanska í størri mun nýtast til fysiska partin av venjingini, sigur Sølvi.